## Bilasølan hart rakt

Fíggjarkreppan hevur rakt bilasøluna meint, og tað sæst aftur í landsroknskapinum. Í 2007 var inntøkan hjá landskassanum av skrásetingargjaldi heilt uppi á 65,8 milliónum krónum fyri teir fyrstu fimm mánaðirnar í árinum. Í fjør, meðan fíggjarkreppan og ringasta óvissan stóð við, rapaði henda inntøkan 37 milliónir niður, niður í 17,3 milliónir krónur, og fyrstu fimm mánaðirnar í ár er tað eitt lítið vet betri, knappar 21 milliónir krónur í inntøkum av skrásetingargjaldi.

## Satsa upp á Facebook

Danskar fyritøkur eru nú eisini farnar at satsa upp á samskiftismiðilin Facebook. Mikudagin boðaði Danske Bank frá, at tey dubba seg á Facebook. Facebook hevur nevniliga víst seg sum ein góður háttur hjá fyritøkum at knýta tættari bond við loyalar kundar. Mikael Lomborg, sum er facebook-konsulentur í fyritøkuni Komfo, sigur, at hetta kann brúkast til at kunna kundarnar og at hava eitt konstruktivt samskifti við teir. – Tað skapar álit millum kunda og fyritøku, og tá álitið er til staðar, kunnu fyritøkurnar byrja at senda handilslig tilboð út til kundarnar gjøgnum Facebook, sigur Mikael Lomborg. Eisini føroyskar fyritøkur satsa upp á Facebook.

# HOL Í HØVDIÐ

**HØPISLEYST** Tað er púra hol í høvdið at krevja Jacob Vestergaard frákoyrdan sum landsstýrismann. Landsstýrismálanevndin skuldi farið heim og lagt frá sær, sigur Jógvan Páll Lassen, løgfrøðingur

Áki Bertholdsen

– Hetta er heilt hol í høvdið av Landsstýrismálanevndini.

Jógvan Páll Lassen, løgfrøðingur, er púra avgjørdur um, at tað er høpisleyst at kalla Jacob Vestergaard, landsstýrismann, lógarbrótara, eftir at hann í heyst rindaði fiskimonnum minstuløn, hóast játtanin á fíggjarlógini ikki rakk.

Løgfrøðingurin sigur, at kravið um at fáa politiska høvdið á landsstýrismanninum, á einum silvurfati, er líka høpisleyst.

– Eg skilji hetta simpulthen ikki, sigur Jógvan Páll Lassen

### Gloyma tað týdningarmesta

Hann sigur, at tað, sum landsstýrismálanevndin politikarar úr andstøðuni gloyma, er, at fiskimenn hava lógartryggjaðan rætt til at fáa minstuløn.



**KROSSFEST**

*Kravið um at fáa høvdið á Jacob Vestergaard á einum silvurfati, er fullkomiliga høpisleyst, sigur Jógvan Páll Lassen, løgfrøðingur*

## Skal betalast við kassa eitt

Jógvan Páll Lassen sigur, at verður sjúklingur viðgjørdur skeivt á sjúkrahúsinum skal hann hava endurgjald. Hetta er ikki eitt endurgjald, sum landið hevði kunna skákað sær undan við at siga, at ongin peningur er á fíggjarlógini til endamálið. Tað skal betalast við kassa eitt undir øllum umstøðum og tað skal inntøkutrygdin hjá fiskimonnum eisini.

– Hetta er ein treytaleyst rættarkrav, sum fiskimenn hava, hóast tað ikki er sett eitt oyra av á fíggjarlógini til endamálið.

Jógvan Páll Lassen staðfestir sostatt, at Løgtingið kann ikki "avtaka" lógina um minstaforvinning til fiskimenn bara við at lata vera við at seta pengar av á fíggjarlógini til endamálið.

– Hugsa tær, hvussu hevði verið vorðið, vissi tað sama gjørdi seg galdandi við fólkapensjónini?, spyr hann. Skulu pensjónistar ikki fáa fólkapensjón fyri tað um ov lítið er sett av á fíggjarlógini? Hetta høpisleys áskoðan, sum als ongi løgfrøðilig heimild er fyri nakrastaðni tí tað er í stríð við allan rætt.

### Leysur av málinum

Jógvan Páll Lassen sigur, at longu í mai mánaði sendir Jacob Vestergaard bræv út í fíggjarmálaráðið, har hann biðjur um eykajáttan til inntøkutrygdina, tí hann vísir á, at undirtøka er ikki fyri politiska ætlanin um at broyta lógina um inntøkutrygd, so at hon minkar.

– Tá ið Jacob Vesgtergaard hevur sent tað brævið út í fíggjarmálaráðið, er hann leysur av málinum og liðugur við sakina, tí eftir hetta er tað eitt fíggjarmál og so er tað Jóannes Eidesgaard, sum eigur tað.

Tað endar so við, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum leggur uppskot um eykajáttan fyri Løgtingið, sum verður samtykt.

Men Løgfrøðingurin sigur, at hóast Løgtingið hevði felt uppskotið um eykajáttan, skulu fiskimenn kortini hava sína minstuløn, tí tað hava teir lógartryggjaðan rætt til.

Men nú kom eykajáttanin so seint, at penngurin varð goldin frammanundan?

– Tað ger ikki mun. Lógin er ikki brotin fyri tað um játtanin til inntøkutrygdina vísir hall akkurát tann dagin, peningur verður útgoldin. Tá ið árið er farið, er javnvág á kontuni og tað er tað, sum telur.

Hann leggur afturat, at hevði Jacob Vestergaard noktað at betalt minstulønina, hevði hann uttan iva verið setevndur og tað hevði kostað landskassanum nógv í endurgjaldi.

*aki@sosialurin.fo*

## Signar vísti vegin

**Vit hava eitt fordømi um hetta, sum nú er fram um Jacob Vestergaard og inntøkutrygdina.**

**Tað er tá ið Signar á Brúnni, landsstýrismaður í mentamálum, á sinni rindaði sjónvarpsfólki løn, hóast peningur ikki var á játtanini.**

**Hann varð frákoyrdur sum landsstýrismaður fyri hetta sama.**

**Men tá varð ein løgfrøðilig kanning gjørd, har úrslitið var, at landsstýrismaðurin hevði borið seg rætt at, tí sjónvarpsfólkið hevði rætt til løn, hóast peningur manglaði á kontuni og tí varð hann reinsaður.**

## Vil verja Jacob

Ein landsstýrismálanevnd, ið kemur til eina niðurstøð sum hesa við Jacob Vestergaard, skuldi lagt frá sær.

Tað hevur Jógvan Páll Lassen, løgfrøðingur.

Hann sigur, at meinti nevndin nakað við, at landsstýrismaðurin hevur brotið lógina, skuldi hon melda hann fyri løgregluni.

- Eg skuldi alt fyri eitt bjóða mær til at verið verji hjá Jacob Vestergaard, tí tað hevði verið lættasta sak av verðini